Álit

í

løgtingsmáli nr. 78/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Virkisskrá
(Dagføring av listanum yvir grundardátur og útflýggjan av p-talinum)

Landsstýriskvinnan í fíggjarmálum, Ruth Vang, hevur lagt málið fram 7. mars 2024, og eftir 1. viðgerð 19. mars 2024 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 2. apríl 2024.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýriskvinnuna í umhvørvismálum, Ingilín Didriksen Strøm, saman við Arbeiðs- og brunaeftirlitinum, og landsstýriskvinnuna í fíggjarmálum, Ruth Vang, saman við TAKS.

Við uppskotinum verða tríggjar høvuðsbroytingar gjørdar í løgtingslóg um Virkisskrá (løgtingslóg nr. 70 frá 9. mai 2019 um Virkisskrá):

- Heimildin hjá privatum virkjum at fáa útflýggjað p-tøl hjá stjórnar- og nevndarlimum verður tillagað, soleiðis at samsvar verður við krøvini í dátuverndarlógini.

- Listin yvir grundardátur verður dagførdur, soleiðis at "roknskaparár" og "eigaraupplýsingar" verða løgd afturat, meðan "starvsfólkatal" verður strikað.

- Umsetningskravið á 30.000 kr. fyri sjálvstøðugt vinnurekandi verður strikað.

Undir hoyringini um hetta málið hevur nevndin fingið frágreiðing frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum um, hvussu uppskotnu broytingarnar fara at ávirka arbeiðið hjá eftirlitinum.

Sambært Arbeiðs- og brunaeftirlitinum fara broytingarnar í virkisskránni, ið snúgva seg um, at eigaraupplýsingar verða lagdar aftrat virkiskránni, at gera tað munandi betur og meira skipað at fremja eftirlit í framtíðini. Hetta tí tað verður lættari at finna upplýsingar um, hvussu nógv og hvørji virkir eru innan ávísa geiran, soleiðis at eftirlitið verður meira skipað og meira fevnandi um ávísa økið.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 18. apríl 2024

Eyðgunn Samuelsen forkvinna	Beinir Johannesen næstformaður	Bjarni Hammer
Eirikur í Jákupsstovu	Hanna Jensen	Magnus Rasmussen
	Steffan Klein Poulsen	